# … Samgonguskjal amillum Tjóðveldi, Javnaðarflokkin og Miðflokkin

Barnatænastan skal styrkjast til at betur at kunna røkja øktar uppgávur sambært lógini um fyribyrgjandi heilsutænastur fyri børn og ung.

*Kommulæknaskipanin*
Kommulæknaskipanin verður endurskoðað og styrkt og uppskot skulu verða gjørd um, hvussu onnur heilsustarvsfólk, m.a. sjúkrarøktarfrøðingar, kunnu verða partar í skipanini. Kommunulæknavaktin skal endurskoðast og fáast at virka betur.

*Psykiatriin*
Menningin av sosialpsykiatriini skal halda fram við at útvega fleiri bústaðar- og virknistilboð til sinnisveik. Økispsykiatriin skal verða útbygd, m.a. við økisdeplum kring landið. Barna- og ungdómspsykiatriin skal verða styrkt, m.a. við denti á fyribyrging og leiklutin hjá avvarandi. Sálarsjúklingar skulu varðveita pensjónina eisini eftir 6 mánaða innlegging á Psykiatriska deplinum. Nýggj psykiatrilóg skal verða samtykt og sett í verk.

*Fólkaheilsuætlanin*
Fólkaheilsuætlan verður sett í verk sambært ætlan, ið er til taks

*Sjúkratrygging*
Sjúkrakassagjaldið verður lagt inn í skattin. Sergjaldsskipan um sjúkrakassagjald verður gjørd fyri tey, sum hava skattafríar nettoinntøkur.

## Almannamál

Almannapolitiska stevnumiðið er at skapa javngóðar umstøður fyri allar borgarar, uttan mun til teirra sosialu støðu, likamliga ella menningarliga førleika ella hvar í landinum, tey búgva, við vælvirkandi, samhaldsføstum vælferðarskipanum.

*Nýggj sosiallóggáva*
Sosialpolitiskur reformur verður gjørdur við nýggjari sosiallóggávu. Almannaskipanirnar skulu háttast soleiðis, at fólk mest møguliga kunnu verða virkin í samfelagnum. Nýggj føroysk forsorgarlóg, sum eisini fremur rættartrygd og gjøgnumskygni, verður smíðað.

*Vælferðarráð*
Vælferðarráð verður skipað á sama hátt sum Búskaparráðið á búskaparpolitiska økinum.

*Vælferðarportalur*
Til tess at bøta um kunningina til borgararnar verður gjørdur ein vælferðarportalur.

*Sosialfrøðilig gransking*
Sosialfrøðiliga granskingin í Føroyum skal verða skipað bæði við betri hagtalsgrundarlagi og við granskingarverkætlanum.

*Stakir uppihaldarar*
Lóg um eyka barnagjald til stakar uppihaldarar skal samtykkjast. Barnapengar skulu ikki verða roknaðir sum skattskyldug inntøka.

*Foreldraráðgeving*
Øll neyðug ráðgeving, leiðbeining og hjálp verður veitt foreldrum í sambandi við barnsburð, so millum annað talið á fosturtøkum framhaldandi kann vera avmarkað eins og stakir uppihaldarar og tør, ið liva undir truplum viðurskiftum, fáa dygga hjálp og vegleiðing.

*Bústaðir til fólk við serligum tørvi*
Íløguætlan verður gjørd fyri nýbygging og nútíðargerð av bústøðum til fólk við serligum tørvi.

*Eldraøkið*
Í eldrarøktini verður hildið fram við at stuðla bygging av røktarheimum og sambýlum, soleiðis at tørvurin fyri búplássum til røktarkrevjandi gomul kann verða nøktaður í samgonguskeiðinum.

Nýggj eldralóg skal verða gjørd til tess at tryggja rættindi og tænastur fyri eldri. Eisini verða ymisku eindirnar í eldrarøktini samskipaðar.

Starvsfólkaorkan í eldrarøktini verður økt bæði til heimabúgvandi og hjá teimum, sum búgva á stovnum og sambýlum.

*Pensjónsreformur verður framdur*
Við lóg um eftirlønaruppsparing skal eftirløn verða tryggjað øllum lønmóttakarum Eftirlønaruppsparingin skal eisini verða roknað aftrat ALS-, barsils- og sjúkradagpengagjaldinum o.ø. almannaveitingum.

Lógarverkið um almannapensjónir verður endurskoðað, so fólkapensjónin verður styrkt serstakliga teimum, ið ikki hava aðra inntøku, til gagns. Pensjónsviðbøturnar, brennistuðul til ávísar pensjonistar og Samhaldsfasti hækka soleiðis, at pensjónin til teirra, sum ikki hava aðra inntøku, hækkar í samgonguskeiðinum.

*Bústaðarpolitikkur*
Alternativ íbúðabygging verður sett í verk. Lóg um lutaíbúðafeløg verður sett í verk, eisini fyri fólk við serligum tørvi. MVG- og rentustuðulslóg skulu broytast, so tær geva lutaeigarum somu rættindi sum øðrum eigarum. Nýggj leigulóg skal tryggja rættindi hjá leigarum og útleigarum.

Húsalánsgrunnurin og Íbúðagrunnurin verða umskipaðir til eitt bústaðarpolitiskt amboð, serliga við atliti at fíggjarliga veikum bólkum, m.a. til at tryggja lagaliga fígging til lutaíbúðafeløg og eisini til fólk við skerdum førleika. Ein onnur uppgáva er at taka stig at byggja leiguíbúðir og lestrarbústaðir eisini saman við øðrum pørtum.

Bjálvingarstuðulslánsgrunnurin verður endurskipaður til at útvega fígging til orku- og bjálvingarstuðulslán til pensjonistar.

## Vinnumál

Vinnupolitikkur samgongunnar hevur til endamáls at tryggja Føroyum fjølbroyttari inntøkugrundarlag, at slóða fyri betri marknaðaratgongd hjá vinnuni og at tryggja henni tryggar og álítandi karmar.

*Dagførd lóggáva*
Til tess at lúka treytirnar í handilsavtalum við ES og onnur lond, sum eru í gildi, og til tess at slóða fyri føroyskum limaskapi í EFTA og eini møguligari EBS-avtalu, verður øll lóggáva innan vinnumál dagførd áhaldandi soleiðis, at hon lýkur tey krøv, ið altjóða felagsskapir og onnur lond seta.

*Arbeiðsmegi*
Skipaður verður ein rúmligari og smidligari arbeiðsmarknaður, har vinnan kann fáa útlendska arbeiðsmegi til Føroya eftir tørvi. Lóggávan á økinum verður yvirtikin og skipað soleiðis, at hon á besta hátt tænir føroyska arbeiðsmarknaðinum.

*Tilfeingisumsiting*
Umsitingin av øllum náttúrutilfeingi og øll lóggáva í hesum sambandi verður savnað á sama stað.

*Íverksetan*
Virkisfús fólk við góðum hugskotum og ætlanum verða stuðlað soleiðis, at leiðin frá hugskoti til veruleika verður léttari at ganga.

*Útflutningsráð*
SamVit verður skipað soleiðis, at tað í størri mun enn nú virkar sum eitt útflutningsráð fyri føroyska framleiðslu.

*Gransking*
Vinnumálaráðið skipar fyri, at vinnan og almenni myndugleikin fara undir vinnurelateraða gransking í nógv størri mun enn nú.

*FAS*
Til tess at menna eina nýggja inntøkuvinnu á sjóvinnu økinum, har vit hava dyggari royndir enn tey flestu, verður Føroyska Altjóða Skipaskrásetingin umskipað soleiðis, at hon verður kappingarfør við aðrar skipanir av hesum slagi.

*Hagstovan*
Hagstovan verður styrkt til tess at tryggja føroyskum vinnulívi neyðugt hagtalsgrundarlag.

*Trygging*
Tryggingarøkið verður liberaliserað. Samstundis verður skattaskipanin broytt soleiðis, at lóggávuverkið ikki eggjar uppspardum pensiónskapitali, sum føroyingar spara saman í lívstryggingum, at vera fluttur út av landinum.

Nýggj rentuskattalóg verður gjørd, sum javnsetur føroysk lívstryggingarsamtøk við líknandi samtøk í grannalondunum og í Europa annars.

*Landbúnaður*
Landbúnaðarlóggávan verða eftirmett og neyðugar broytingar gjørdar.

*Kolvetni*
Samgongan fer at fáa lýst tey árin á og teir møguleikar fyri føroyska samfelagið, sum kunnu standast av eini møguligari oljuvinnu innan umhvørvi, mentan, sosiala økið og arbeiðsmarknað.

*Fiskivinna*
Fiskivinnupolitikkurin hevur sum høvuðsmál, at ríkidømið í havinum verður umsitið sum varandi grundarlag undir føroyska búskapinum. Skipast skal soleiðis fyri, at mest møgulig virðisøking úr føroyskum tilfeingi liggur eftir í Føroyum, og allir úrdráttir av veiddum fiski koma til virkingar og gagns í framleiðsluni.

Samgongan ásannar, at tað er ein trupulleiki, at brúksrættindini til almenna náttúrutilfeingið verða handlað og seld á privata marknaðinum.

Tørvur er á eini tjóðarsemju um fiskivinnupolitikkin, nú Løgtingið hevur samtykt broytingar í lógini um vinnuligan fiskiskap viðvíkjandi loyvum og fiskirættindum,



*Heini O. Heinesen setti tingið sum ellisformaður. Tað gjørdi hann eisini í 2002. Heini O. Heinesen fyllir 70 ár 6. august í ár*

*Mynd: Ólavur Frederiksen*